

## Brasil skiftur venjara

Carlos Alberto Parreira er ikki longur venjari hjá heimsstjørnunum úr Brasil.

Í tíðindaskrivi staðfestir brasilska fótbóltssambandið, at talan var um eina felags avgerð, har bæði sambandið og venjarin hildu tað vera best, at partarnir skiltust.

Parreira var venjari hjá Brasil í HM-endaspælinum, men hann var fyri hørðum atfinningum í heimlandinum. Brasil tapti móti Fraklandi í 1/8 finaluni, og í teimum fimm dystunum, sum liðið spældi, megnaðu teir ongan tíð av álvara at sveiggja seg upp á ætlaðu hæddirnar.

**-mørk**

## U15 vann triðja stórsigurin

Føroyska U15 landsliðið vann mikukvøldið enn ein stórsigur í Aberdeen International Football Festival

Seinasti dysturin í bólkaspælinum hjá U15 landsliðnum var ímóti russiska liðnum Gomel, og aftur í kvøld vunnu Føroyar stórt.

Tað var greitt frá byrjan, at stórur munur var á liðunum, og tá ið dómarin bríkslaði seinastu ferð, høvdu Føroyar skorað 11 ferðir.

Gilli Sørensen úr TB (myndin) skoraði 4 mál, Helgi Samson úr KÍ 3, Jógvan Skeel úr HB 2, og Heini Vatnsdal úr VB/TB/S og Sørmund Kalsø úr KÍ hvør sítt.

Føroyar vunnu sín innleiðandi bólk við fullum stigatali og spæla fríggjadagin hálvfinalu í kappingini.

**-ek**

# Hafsteinn vann prologin



*Gunnar Dahl Olsen var besti føroyski súkklarin, tá Statoil kring Føroyar byrjaði við einkulstarti mikudagin*
*Mynd: www.tsf.fo*

**Íslendski Hafsteinn Ægiur Geirsson var nógv skjótastur, tá Statoil Kring Føroyar í gjár byrjaði við einkulstarti**

SÚKKLING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Stórasúkklukappingin–Statoil kring Føroyar – byrjaði í gjár, tá einkultstartur var á skránni í Klaksvík. Og ikki heilt óvæntað var íslendski Hafsteinn Ægir Geirsson skjótastur á hesum.

Á stutta teininum sær íslendingurin sær ein fyrimun upp á 28 sekund í mun til næsta súkklaran, sum var føroyski Gunnar Dahl Olsen.

Hjá unglingum var Torkil Veyhe fremsti súkklarin. Hann hevði heili 32 sekund niður til næsta súkklaran, sum var liðfelagin í Tórshavnar Súkklufelag, Sigmund Olsson.

### Upp í 400 metrar

Í dag verður næsta etapan í kappingnini súkklað, og hesa ferð eru tað 105 kilometrar, sum skulu súkklast í Eysturoynni. Byrjað verður á Oyri, og síðai veðrur súkklað umvegis Norðskála, Ljósáir, Eiðisskarð, Funning, Funningsbotn, Oyndarfjørð, Skálabotn, undir Gøtueiði, Gøtur, Leirvík, Runavík, Toftir og runt agnið, áðrenn kósin verður sett móti málinum, sum er á Statoilstøðini við Saltangará.

Á hesi ferðini er talan um fleiri tungar brekkur, og tað er væl hugsandi, at feltið skrædnar rættiliga tíðliga á ferðini. Um Eiðisskarð skulu súkklararnir nevnliga upp í 400 metra hædd, og tað líkist eini brekku, sum veruliga kann skapa sjógv millum fremstu súkklararnar og restina.

## Tey fremstu

### Vaksin

| Nr | Navn | Tíð |
|---|---|---|
| 1 | Hafsteinn Ægir Geirsson | 10,57 |
| 2 | Gunnar Dahl-Olsen | 11,25 |
| 3 | Kári Brynjólfssson | 11,32 |

### Kvinnur

| Nr | Navn | Tíð |
|---|---|---|
| 1 | Jenny Wright | 12,41 |
| 2 | Christine McLean | 13,05 |
| 3 | Caroline Jane Simpson | 14,00 |

### Unglingar

| Nr | Navn | Tíð |
|---|---|---|
| 1 | Torkil Veyhe | 11,56 |
| 2 | Sigmund Olsson | 12,28 |
| 3 | André Tolstoj | 12,32 |




*Talan er um fleiri tungar brekkur, tá súkklararnir í dag súkkla í eysturoynni*
*Mynd: www.tsf.fo*

## Símun átti uppleggið

Týskvøldið fór íslendska landskappingin í heilt stuttan summarsteðg. 11. umfar varð spælt liðugt týskvøldið, tá ið tríggir dystir vóru á skránn1.

Við føroyskum eygum hevði tað serligan áhuga, at Keflavík við Símuni Samuelsen á miðvøllinum í vinstru var í Reykjavík, har teir spældu móti Víkingi.

Keflavík hevði mesta partin av spælinum og bestu møguleikarnar. Men teir megnaðu bara 1-1, og tað vóru teir í Keflavík ikki frítt vónbrotnir av.

Keflavík legði seg á odda tveir minuttir undan steðginum. Guðmundur Steinarsson setti bóltin í málið, eftri at Símun Samuelsen hevði staðið fyri upplegginum. Símun var allar 90 minuttirnar á ytsta miðvallar plássinum í vinstru hjá Keflavík.

Teir í Keflavík hildu eftir 1. hálvleik, at teir áttu at havt verið frammanfyri 3-0. Men teir høvdu bara fingið eitt mál, og tí kostaði tað tvey stig, tá ið Víkingur javnaði til 1-1, tá ið 2. hálvleikur var tíggju minuttir gamal.

Síðstu tíggju minuttirnar trýsti Keflavík nógv fyri at fáa sigursmálið, men tað eydnaðist teimum ikki.

Sjálvt um tað er steðgur í landskappingini fram til 27. juli, so skal Keflavík aftur í eldin nú sunnudagin. Tá skulu teir í steypakappingini spæla á útivølli í Akranesi.

Í landskappingini er FH oddalið eftir ellivu umfør. Liðið á Hafnafirði hevur 26 stig. Keflavík og Víkingur eru 4. og 5. plássi við 15 stigum.

**-mørk**

## Byrjaðu uttan føroyingar

Eingin føroyingur var á vøllinum, tá danska superligan varð sparkað ígongd í gjárkvøldi. Og hon varð sparkað ígongd uttan tær heilt stóru sensatiónirnar, kann leggjast afturat.

Við einum máli frá Alvaro Santos vunnu meistararnir úr FCK 1-0 á útivølli móti AC Horsens, meðan Brøndby á heimavølli vann 2-1 á Vejle. Vejle legið seg tíðliga í dystinum á odda, men við málum frá Martin Ericsson og Morten Duncan Rasmussen fekk Brøndby vent gongdini seinasta hálva tíman.

Oddalið eftir fyrsta umfarið er FC Nordsjælland, sum vann ikki minni enn 5-0 á Randers FC. AaB – uttan Súna Olsen og Jón Róa Jacobsen í hópinum – vann 3-1 á heimavølli móti Viborg. Esbjerg vann 2-1 á Silkeborg, og OB og FC Midtjyllan spældu einasta javnleikin, tá dysturin í Odense endaði við 1-1 javnleiki.

Teir báðir føroyingarnir í AaB royna báðir at koma seg eftir skaða, og tí taldust teir millum áskoðararnar, tá Viborg vitjaði. Her helt Viborg leingi fast um 1-1, men teir tríggjar seinastu minuttirnar skoraði heimaliðið tvær ferðir, og tað hóvaði ivaleyst stigasvongu heimaáskoðarunum.

**-mørk**